# ítróttur

Nr. 138 • hósdagur • 24. juli 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fýra spælarar stríðast um tvey pláss

**Fyri at fáa meiri ferð í og harvið størri hóttan í álopspartin verður umhugsað at finna nýggja samanseting til tvey tey fremstu plássini, og í verjuni er eisini stór kapping um plássini**

FØROYAR-ÍSLAND
*Jóannes Hansen*



*Andrew av Fløtum og John Petersen passa kanska ikki nóg væl saman at spæla saman í álopinum. Spurningurin er, hvussu álopið fer at síggja út mikukvøldið. Her er Andrew í dysti ímóti Íslandi fyri nøkrum mánaðum síðani*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í øllum regninum fyrrapartin í gjár hittust teir í føroysku landsliðsleguni. Málið er at røkka einum so góðum úrsliti, sum tað ber til. Her verður ikki hugsað um tepurt tap og kanska javnleik. Málið er at vinna. Tað er eitt høgt mál, men tað er ikki ov høgt. Ísland er oddalið í bólkinum, og tað eru avgjørdar vánir fyri, at grannarnir fyri vestan fyri fyrstu ferð nakrantíð fara at vinna sær pláss í einum endaspæli. Ógvuliga nógv vatn er runnið í ánna, síðan føroyingar fyri hálvum triðja mánað síðani vóru á Laugardalsvøllinum í Reykjavík. Ta ferðina var um reppið, at tað endaði 1-1, áskoðararnir vóru so smátt farnir til hús við tí fatan, at leikluturin hjá Íslandi í hesi EM undankappingini var av, men so var tað, at Ísland skoraði sigursmálið, og síðani hevur einki heft fyri teimum.

Lars Høgh var málmansvenjari í sambandi við útidystin í Reykjavík og heimadystin ímóti Týsklandi. Aftur hesa ferð skal hann taka sær av Jákupi Mikkelsen og Jens Martini Knudsen. Saman við Henrik Larsen, landsliðsvenjara, og Jákupi Mikkelsen kom hann til Føroya sunnudagin. Í gjár skuldu hinir útisetarnir koma. Teir eru ikki so nógvir nú, sum teir onkra ferðina hava verið – Julian Johnsson úr Íslandi, Jón Rói Jacobsen, Brøndby og Christian Høgni Jacobsen úr Vejle.

### Holini

Sammett við liðið, sum spældi í Reykjavík, skulu í hvussu so er tvær broytingar gerast, og tað kann væl vera, at í hvussu so er ein broyting verður gjørd afturat. Jákup á Borg og Fróði Bejaminsen eru leikbannaðir, og tí skal ein nýggjur miðvallari í høgru finnast og ein sentralur miðvallari. Teir fyrstu ellivu í Reykjavík vóru hesir: Jákup Mikkelsen – Christian Høgni Jacobsen, Jóhannis Joensen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen – Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen, Rógvi Jacobsen – John Petersen, Andrew av Fløtum.

Tað var óvæntað, at Julian Johnsson var settur á beinkin í Reykjavík. Eftir steðgin kom hann á vøllin. Tað hevur ligið væl fyri hjá Juliani í Akranesi, har hann er fastur maður, og tí er eingin ivi um, at hann verður á miðvøllinum í morgin. Hin sentrali miðvallarin verður so Jann Ingi Petersen ella kanska Atli Danielsen, sum hevur verið sera stinnur, síðani hann slapp at royna seg mitt á KÍ miðjuni. Síðsta sjónliga prógvið fyri hetta var í Molde hóskvøldið.

Tað eru fleiri møguleikar, tá ið tað ræður um avloysaran í høgra borði, har Jákup á Borg hevur verið fastur maður seinastu árini. Ein møguleiki er, at Christian Høgni Jacobsen, sum seinast var vongverji í høgru, verður fluttur fram á miðvøllin. Ein annar møguleiki er, at Hjalgrím Elttør verður settur í hetta plássið, ein triði møguleiki er Atli Danielsen og Tór-Ingar Akselsen, sum er spildur nýggjur í hesum høpinum, fær plássið.

### Ivamálini

Eftir tepra tapið í Reykjavík nevndi Jógvan Martin Olsen, tað tóktist vera ein trupulleiki, at álopsspælararnir báðir, John Petersen og Andrew av Fløtum, líkjast ov nógv. Teir eru báðir góðir við bóltinum, og teir hava báðir gott eyga fyri spælinum. Trupulleikin var, at tað knípti við ferðini ella eksplosivitetinum. Spurningurin er, um tað við broytinum, útskiftinum ella umbýtingum ber til at finna fram til uppstilling, sum ber størri ferð og harvið brodd og tyngd í álopspartinum við sær.

– Vit mugu síggja í eyguni, at vit hava stórar trupulleikar at spæla okkum til upplagdar málmøguleikar, sjálvt um samanspælið annars gongur væl. Møguleikarnir fyri at fáa hetta at eydnast eru eitt nú tengdir at ferðini. Hana restaðu vit í Reykjavík, staðfestir Jógvan Martin Olsen, sum ikki vil gera nærri viðmerkingar til, hvørjar møguleikar Henrik Larsen og hann hava umhugsað og fara at royna undir venjingunum, sum vóru í gjár og aftur vera á skránni í dag. Tað er ikki vist, at allar venjingarnar vera á Tórsvølli. Regnið og tað at vøllurin tykist eitt sindur óslættur kunnu hava við sær, at onkrar venjingar verða á Argjum.

Tað ber væl til at ímynda sær, hvat tað eru fyri møguleikar, sum eru uppi og venda. Tað er eingin ivi um, at John Petersen ella Andrew av Fløtum vera á vøllinum. Møguleikin er framvegis opin fyri, at teir báðir vera millum teir fyrstu ellivu, men tað verður umhugsað at finna nýggja kombinatión, har annar teirra fær nýggjan makkara. Bestu boðini upp á nýggjan álopsspælara eru Christian Høgni Jacobsen og Hjalgrim Elttør.

Christian Høgni situr nógv á beinkinum í Vejle, men hann hevur áður víst seg at hava máltev á landsliðnum. Hjalgrím Elttør er væl fyri í løtuni. Hann er toppskjútti í 1. deild, og hann tykist hava stórt sjálvsálit.

Umframt álopsplássini so bendir nógv á, at broytingar fara at verða gjørdar í verjupartinum. Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen eru sjálvskrivaðir í ávikavist miðverjuni og í vinstra borði. Í Íslandi var Jóhannis Joensen miðverji og Christian Høgni Jacobsen vongverji í høgru. Pól Thorsteinsson og Óli Johannesen eru tøkir aftur eftir leikbann og Hans Fróði Hansen, sum hevur spælt sera væl og er ein av orsøkunum til, at B68 er næstfremst og at bara sjey mál eru farin ígjøgnum hjá toftamonnum í tólv dystum, er úttikin aftur.

Í vikuskiftissendingini hjá útvarpinum fríggjakvøldið nevndi Jógvan Martin Olsen, at teir fara at tosa við Óla Johannesen, sum – fyribils í hvussu so er – spælir á 2. deildarliðnum hjá TB. Sum vit søgdu í síðstu viku, so ber ikki til at seta ein veteran, sum hevur spælt 60 landsdystir og sum hevur verið stinnur, av landsliðnum. Óli Johannesen hevur uppiborið at fáa møguleikan at vísa, at tað framvegis er dugur í honum. Men sjálvandi er kappingin um plássini í verjuni væl størri, enn hon nakrantíð hevur verið.



# Jákup er í heilt nýggjum umstøðum

**Krøvini til liðið og einstøku spælararnar eru væl størri og eirindarleysari í Skotlandi, enn landsliðsmálverjin hevur upplivað í øðrum londum**

SKOTLAND
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen man vera tann føroyski fótbóltsspælarin, sum hevur flestu royndirnar í fremstu røð. Eftir at hann í 1994 flutti úr KÍ hevur hann spælt í fremstu røð í trimum ymiskum londum – í Danmark, Noregi og nú í Skotlandi, har hann leygardagin fyri aðru ferð vardi málið hjá Partick Thistle, sum framvegis eigur fyrsta sigurin í nýggja kappingarárinum til góða.

Hesa ferð tapti Partick Thistle 2–1 á útivølli ímóti Kilmarnock, eftir at Jákup og teir eina løtu høvdu verið á odda.

– Tað er altíð týdningarmikið í fótbólti at vinna. Men krøvini og avleiðingarnar í Skotlandi kennast nógvar ferðir størri, enn tey hava gjørt aðra staðni, har eg havi verið, staðfestir Jákup Mikkelsen, sum sunnudagin var ein svipp í Klaksvík og heilsaði upp á familjuna, áðrenn hann í gjár fór undir fyrireikingarnar til landsdystin ímóti Íslandi.

Í skotsku fjølmiðlunum segði Partick Thistle venjarin undan vikuskiftinum, at tað var alneyðugt hjá Jákupi at vísa seg frá allar bestu síðuni, um hann skuldi varðveita sessin millum stólparnar, eftir at hin málverjin nú er komin fyri seg aftur.

– Enn havi eg ikki havt serliga nógv at gera. Í 1. hálvleiki fekk eg møguleika eina ferð at bjarga. Vit vóru á odda, men teir fingu tvey mál, men eg haldi ikki, at tað bar til hjá mær at gera nakað við tær báðar royndirnar. Í fyrra førinum var talan um fluktara frá brotsteigarmarkinum, eftir at bólturin, sum var á veg av vøllinum, varð stútaður út frá aftur av einum av okkara. Í seinna førinum var talan um frísparksinnlegg, sum varð beint ov stutt burtur. Skotið var dygst úti við stólpan. Eg tveitti meg rætta vegin og fekk fingrarnar á bóltin, men tíverri fór hann í málið, greiðir Jákup Mikkelsen frá.



*– Tað er altíð týdningarmikið í fótbólti at vinna. Men krøvini og avleiðingarnar í Skotlandi kennast nógvar ferðir størri, enn tey hava gjørt aðra staðni, har eg havi verið, staðfestir Jákup Mikkelsen*

### Undirmannaðir

At málini komu eftir verjukiks kom stak illa við hjá Jákupi og liðfeløgunum í Partick Thistle. Longu í 18. minutti sá David Lilley reytt fyri óneyðugt ógvusligt fríspark um miðstrikuna. Harvið var talan um manningarliga yvirvág til heimaliðið síðstu fimm korterini.

At tað var Martin Haardie, sum skoraði útjavnandi málið tíðliga í 2. hálvleiki, kendist meint í Partick Thistle leguni. Undan summarsteðginum flutti hann úr Glasgow felagnum, har hann hevur verið sera nógv avhildin í tey fýra árini, hann var í Partick.

Leygardagin fer tað ivaleyst at vera nóg mikið at takast við hjá Jákupi Mikkelsen. Tá fer Partick Thistle at fáa vitjan av øðrum av stóru feløgunum í Glasgow. Celtic Glasgow kemur á vitjan, og so er bara at vóna, at landsliðsferðin til Føroya og harvið fráveran frá venjing fram til og við hósdegnum ikki fer at kosta Jákupi plássið millum stólparnar.

# Lítið krút í Lyn

**Molde basti á útivølli Lyn við sama málmuni, sum teir hóskvøldið vunnu við á heimavølli ímóti KÍ**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tey bæði norsku feløgini, sum KÍ og NSÍ stríðast við í UEFA Cup kappingini, hittust sunnukvøldið í botnuppgerð í Oslo. Tað vóru gestirnir úr Molde, sum fóru úr norska høvuðsstaðnum við øllum. Molde vann 2–0, eftir at tað hevði verið málleyst í steðginum. Harvið vann mótstøðuliðið hjá KÍ í UEFA Cup við sama muni á Lyn, sum teir hóskvøldið vunnu á KÍ á Molde stadion.

Magne Hoset, sum hóskvøldið setti hol á ímóti KÍ við brotssparki, skoraði aftur hesa ferð upp á brotsspark. Hann legið Molde framum, tá ið ein tími var farin. Fimm minuttir seinni vildu Lyn menninir hava dómaran at døma brotsspark, tí ein av teirra skuldi hava verið feldur í brotsteiginum, men dómarin tagdi. Íslendski venjarin hjá Lyn, Teitur Þordarson, var ikki blíður, og Molde venjarin, Odd Berg, ásannaði aftaná, at hesa ferð hevði dómurin verið teimum til vildar.

Lyn trýsti síðstu løtuna fyri at fáa útjavnandi málið, men tað eydnaðist ikki. Í staðin var tað Molde, sum í síðsta minutti staðfesti kærkomna sigurin. Enn eina ferð var tað Magne hoset, sum var málskjútti. Í 1. hálvleiki var hann í álopinum. Tá fekk hann einki mál. Í 2. hálvleiki var hann miðvallari í vinstru í 4–3–3 spælskipanini, sum Molde eisini nýtti ímóti KÍ, og tá skoraði hann tvey mál!

Lyn hevur tapt fimm landskappingardystir á rað. Teir eru triði aftast, og tað resta fýra stig upp til fjórði aftasta plássið, sum ber trygd fyri framhaldandi luttøku í bestu deildini við sær. Molde hevur 20 stig.

### Sum væntað

Hjá Rosenborg var eingin slingur í valsinum, tá ið teir vóru á vitjan í Aalesund, eftir at tað mikukvøldið á heimavølli í Europa Cup ikki hevði eydnast at fáa meiri enn málleysan javnleik ímóti La Corunia.

Rosenborg vann 2–0, og teir hava beina kós ímóti tólvta meistaraskapinum á rað. Hjá gamla stórfelagnum, Lillestrøm, hevur tað ikki verið so stuttligt seinastu árini, men nú glógvaði í. Teir vunnu 4–0 á heimavølli ímóti Bryne.

Sogndal misti eitt sindur í stríðnum um heiðursmerkini, tá ið teir bara megnaðu málleysan javnleik á heimavølli ímóti Vålerengen. Odd Greenland smurdi á heimavøllinum í Skien Tromsø av 5–0, og Bodø/Glimt styrkti um sína støðu ímillum tey fremstu, tá ið teir vunnu 3–1 á heimavølli ímóti Stabæk. Millum Stavanger og Bergen var tað rættuliga málríkt. Dysturin millum Viking og Brann endaði 3–3.

